# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Tað kann væl henda, at Barrack Obama vinnur uppstillingina, nú hann fær stuðul frá Oprah Winfrey*
*(Donna Brazile)*

# Tí sakk Estonia so skjótt



*Eitt bjargingarskip bjargar bógportrinum á Estoniu. 850 fólk, teirra millum 501 sviar, doyðu í vanlukkuni. 137 fólk vórðu bjargað*

**Luftkanalir í skipinum gjørdu, at sjógvur slapp inn og trýsti luftina út**

Tvær frágreiðingar, ein svensk og ein týsk, hava staðfest, hví ferjan Estonia sakk í Eystrasalti tann 28. september í 1994, og niðurstøðan í báðum var tann sama. Bógportrið loysnaði og brotnaði av skipinum, so sjógvur slapp inn á bildekkið, til skipið at enda holvdist og sakk.

Ein triðja frágreiðing er á veg. Hana ger svenski stovnurin SSPA, men sambært Aftonbladet er niðurstøðan tann sama sum í hinum báðum frágreiðingunum. Tó onkur munur er.

Modellroyndirnar og útrokningarbar hjá SSPA vísa, at Estonia legði seg umleið 45 stig, tá sjógvur var komin inn á bildekkið, ig tá sjógvurin eisini byrjaði at renna niður á tey niðaru dekkini. Tá skipið legði seg uppaftur meiri, vórðu vindeyguni oman fyri bildekkið trýst inn, og tá kom sjógvur eisini inn á tey ovaru dekkini. Hetta eru frágreiðingarnar samnar um, men fleiri hava spurt, hvussu tað kundi bera til, at ferjan sakk so skjótt, sum hon gjørdi.

- Eg eri sannførdur um, at tað ber til at prógva tað, og eg vænti, at okkara royndir fara at prógva, hví skipið sakk so skjótt. Orsøkin er, at skipið hevði fleiri luftkanalir. Í aðrari skipssíðuni slapp sjógvurin ígjøgnum luftkanalirnar, og í hinari síðuni trýsti sjógvurin luftina út úr skipinum. Hetta er ikki kannað fyrr, men vit kanna tað, sigur Claus Källström, kanningarleiðari hjá SSPA, við svensku tíðindastovuna TT.

# Oprah kann avgera uppstillingina



*Barrack Obama hevur góða grund til at vera fegin um stuðulin. Her er hann saman við konu síni Michelle og Oprah Winfrey*

**Kenda amerikanska sjónvarpskvinnan Oprah Winfrey skal hjálpa Barrack Obama at vinna kappingina um at gerast forsetavalevni hjá demokratunum**

Líka síðani kappingin um demokratiskuuppstillingina byrjaði, hevur Barrack Obama havt ilt við at standa seg ímóti Hillary Clinton, og hóast hann onkuntíð hevur togað seg eitt vet inn á hana, er hann sum oftast dragnaður aftur stutt eftir. Nú hevur hann ásannað, at uttan hjálp kann hann ikki fáa fyrrverandi forsetafrúna aftur.

Tað eru fáir persónar í amerikanska sjónvarpsmeldrinum, ið eru betur umtóktir enn Oprah Winfrey, og hon hevur einki ímóti at brúka sítt góða umdømi til at hjálpa Obama við. Tað er ikki nakað nýtt, at hon styðjar Obama í valstríðnum. Í septembur skipaði hon fyri einum innsavningartiltaki til frama fyri hansara valstríð.

Næsta vikuskiftið skal Barrack Obama halda røðu á veljarafundum í statinum Iowa, og tá fer Oprah Winfrey at hjálpa honum. Hon verður eisini á veljarafundum í New Hampshire og South Carolina í næstum.

Tann 3. januar verða tey fyrstu uppstillingarvalini, og tá fæst at síggja, hvat Obama hevur fingið burtur úr hjálpini.

- Eg kann ikki hugsað mær nakran kendan amerikanara, ið hevur somu støðu sum hon, og tað kann væl henda, at hon kann avgera uppstillingina hjá demokratunum, sigur Donna Brazile, ið stóð fyri valstríðnum hjá Al Gore í 2000.

## STUTT SAGT

### Trot á tyrlum kring heimin

Tað vísir seg, at tað eru alt ov fáar tyrlur til hjálpar- og bjargingararbeiði, og í løtuni leita bæði ES og NATO eftir tyrlum til hesi endamál. Ein orsøk er, at tørvurin á tyrlum til ymisk hjálpar- og friðararbeiði er vaksin nógv tey seinastu árini, og úrslitið er, at í dag er tað at kalla vónleyst at finna nakra tyrlu, sum er til leigu. Eitt annað er, at tyrlur skulu til eftirlit ella umvælast rættiliga ofta, og sambært tíðarritinum Jane's Defence Weekly er neyðugt at hava millum 24 og 32 tyrlur tøkar, um átta skulu vera í vinnu alla tíðina. Ein vansi er eisini, at tað krevur lutfalsliga nógv fólk at halda ein tyrluflota við líka, skrivar tað viðurkenda tíðarritið.

### Cheney hjartasjúkur

Amerikanski varaforsetin, Dick Cheney, hevur trupulleikar við hjartanum og skal til kanningar. Ein talskvinna hjá varaforsetanum sigur, at Cheney fór til læknan, tí hann hevði verið forkølaður og skal ikki av við hostan. Men kanningin hjá læknanum staðfesti, at varaforsetin hevði eisini trupulleikar við hjartanum, og hann fekk tí boð um at fara á sjúkrahús til kanningar, sigur talskvinnan. Dick Cheney hevur ofta havt trupulleikar við hjartanum fyrr.

### Ovastin fekk sekkin

Ovastin hjá ferðsluløgregluni í Rom hevur fingið sekkin. Eitt var, at hann hevði parkerað sín egna bil ólógliga, men verri var, at innan fyri rútin á bilinum hevði hann lagt eitt skelti, sum segði frá, at ein bileigarin var rørslutarnaður og tí hevði ávís serrættindi til parkering. Ein 86 ára gomul kona hevði átt skeltið, men tað vísti seg at vera útgingið. Ovastin hevur viðgingið seg sekan og hevur fingið sekkin, skrivar blaðið Il Messagero.